


*Nr. 23* *7. november 2021* *81. árg.*

# Gud hatar skurðgudadyrkan

Mong hava torført við at skilja, at Gud hatar. Men sjálvandi hatar Gud villleiðing og lygn, sum vilja stjala hansara elskaðu menniskju.

Gud segði við jødarnar í 5. Mósebók 16,21–22: „Tú mást ikki **seta niður Ásjerustólpa av nøkrum træi hjá tí altari, sum tú reisir Harranum**, Gudi tínum ella steinsúlu, tí at tílíkt hatar Harrin, Gud tín.“

Ásjerustólpar vórðu reistir sum minnismerki fyri gudinnuna Ásjeru, men Gud hataði tað. Eitt tað fyrsta, Gideon gjørdi, var at sorla Ásjerustólparnar. (Dóm. kap. 6). Gud sigur við øll menniskju: „Skilaleys eru tit, ið bera gudamynd av træ og tilbiðja ein gud, ið ikki kann veita hjálp.“ Jes. 45,20. – „Tú skalt sorla gudamyndir teirra og smildra steinsúlur teirra.“ 2. Mós. 23,24. Alt, sum ikki var av Gudi, skuldi burtur av altarinum.

Hvat er okkara uppgáva? Hin sama sum tann hjá Paulusi, tá ið hann møtti teimum griksku filosoffunum á Areopagos í Aten. Teirra religión var filosofi. Teir kallaðu Paulus „ein geipara, eitt møsn“. (Áps. 17,18). Hann svaraði teimum: „Tá ið eg spákaði gjøgnum býin og hugdi at halgidómi tykkara, fann eg eisini altar við hesi innskrift: „Fyri ókendan Gud“. Hann, ið tit soleiðis dyrka og ikki kenna, hann kunngeri eg tykkum.“ (v. 23 V.D.)

**Kenn Kristus – og ger hann kendan – í einari meira og meira Kristus-leysari verð!**

*Effie Campbell* umsetti.

# HAR RÓSAN ALDRI DOYR

*„Tí at so elskaði Guð heimin, at hann gav son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív." Jóh.3,16.*

Áshild Burnett, sum býr í Danmark, skrivar í Aglow-blaðum m.a. soleiðis:

Eg eri uppvaksin í einum ógvuliga vøkrum staði í Norðurnoregi – á oynni Engleøy. Mamma, sum gjørdist 87 ára gomul, var ein stillfør og trúgvandi kona, sum gekk í kirkju hvønn sunnudag og las dagliga í andaktsbókini og Bíbliuni.

So gjørdist mamma sjúk. Hon hevði krabbamein í tjúkktarminum og varð løgd undir skurð. Hon fekk eitt hálvt ár afturat og kundi verða heima, tí hon fekk heimahjálp, og ein dóttir, sum búði á einum bóndagarði tætt við, kom eisini ofta at hjálpa.

Vit eru fýra systrar. Tvær búgva tætt við hjá mammu, ein er sjúkrasystir og er úti sum trúboðari. Vit komu allar fýra heim, tí mamma versnaði í hvørjum.

Ein dagin hevði mamma eina stóra uppliving við Harranum, og hetta hevur sett síni djúpu spor í alla familjuna. Hon elskaði at hoyra sangir um Jesus og himmalin, tá ið hon var so fræg, at hon orkaði. Ein teirra, sum henni dámdi væl at hoyra, var „Der, hvor roser aldrig dør."

Eitt kvøldið tosaði hon við systur mína, sum er trúboðari, um tað nú mundi vera nóg mikið, at hon bað til Gud, og um hon nú kundi trúgva, at hon hevði fingið fyrigeving fyri syndir sínar.

Dagin eftir tóktist tað, sum fór hon ikki at vakna aftur. Hon lá still og svav óvanliga leingi. Hon var jú ússalig og fekk illa tosað. Brádliga vaknaði hon og setti seg á songarstokkin og fór við harðari og skilligari rødd at greiða frá, at hon hevði havt eina opinbering frá Gudi. Mamma hevði ongantíð áður brúkt so sterk orð!

Hon greiddi frá, at alt rúmið fyltist við einum sterkum ljósi, og á einum skelti stóð skrivað „ALT ER BETALT". Hon helt á at prædika í hálvanannan tíma við skilligari rødd fyri báðum systrum mínum. Hon hevði sanniliga upplivað nakað. Nú visti hon, at Jesus hevði goldið fyri hennara og okkara syndir,

tá ið hann doyði á krossinum. Tað var hennara boðskapur til okkara. Øll familjan skuldi hoyra tað, segði hon, og vit máttu taka ímóti hesari gávuni, sum tað er at fáa syndir sínar fyrigivnar. Øll gjørdust so sterkt ávirkað av hennara uppliving.

Eina viku seinni doyði hon. Við jarðarferðina merktu vit sterkt Guds nærveru í kirkjuni. Eg las bíbliuversið upp, sum foreldur míni fingu í teirra brúðartalu, Matt. 6,33: „Men søkið fyrst Guðs ríki og rættvísi hansara, so skal alt hetta verða tykkum givið umframt." Prestur talaði út frá hesum orðinum í prædiku síni. Sangurin, sum mammu dámdi so væl „Der, hvor roser aldrig dør", varð sungin solo. Øll æra til Jesus.

*Effie Campbell* umsetti.

## Ikke en spurv til jorden

Ikke en spurv til jorden,
uden at Gud er med.
Ikke en sjæl mod døden
uden hans kærlighed.
Ikke en blomst er visnet,
ikke en tåre faldt,
uden at Herren ved det,
han, som er overalt.

Tro det, når stormen hærger
bladløse vintertræ'r.
Tro det, når brændingen bryder
over de nøgne skær.
Tro det, når ubeskyttet
midt i en kamp du står.
Tro det, når helt alene
du med en smerte går.

Tro det, når noget brister
uden at vokse frem.
Tro det, når nogen mister
det, som var alt for dem.
Tro det, når håb går under
uden at rejse sig.
Ikke en spurv til jorden!
Det er et ord til dig.

*Ingeborg Prytz Fougner*

# Frælsi

Rigmor Holst helt eina andakt á Kanal 10 Norge, har hon segði nakað soleiðis:

Fólk rópa upp um frælsi á so nógvum økjum. Tey krevja at hava frælsi á hjúnaøkinum, at gera av, hvørji ið tey eru. Tey vilja brúka lív sítt uttan nakrar avmarkingar, og so halda tey, at tey gerast lukkulig.

Fyri nøkrum árum síðani vóru vit nøkur, sum fóru oman á torgið at syngja. Nógv fólk samlaðust. Ein maður, sum var týðiliga ávirkaður, bleiv við at órógva og rópa: „Tit kristnu vilja gera fólk ófræls. Tit siga, at vit kunnu ikki hetta, og vit kunnu ikki hatta. Tað siga tit bara, fyri at vit ikki skulu gerast lukkulig."

Tann eini maðurin, sum var í okkara bólki, skar ein strong á gittaranum av og blakaði hann niður í túnið. Strongurin snurlaði seg saman. „Nú er hesin strongurin frælsur," rópti hann. „Hann er ikki longur bundin til tvey punkt á gittaranum. Men av tí at hann er leysur, liggur hann samanringdur í túninum og kann ikki gera tað, sum hann var ætlaður og skaptur til at gera. Hann er ikki til nakra nyttu. Soleiðis er tað við okkum menniskjum. Kvetta vit við Gud, okkara Skapara, so spilla vit lív okkara og fáa ikki tað maksimala burtur úr tí. So verða vit sum avkvetti strongurin, vit koma at liva eitt kryplað lív og missa alt tað góða, sum Gud hevði ætlað okkum."

Og soleiðis er tað. Jesus sigur um seg sjálvan: „Um tí sonurin (Jesus Kristus) fríar tykkum, tá skulu tit **verða av sonnum frælsir**." Jóh. 8,36. At verða bundin at Jesusi gevur satt frælsi.

*Effie Campbell.*

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 7. nov. | Tekstur: Opb. 21,1-5 | bíbliuorð: Opb. 21,5 |
| 14. nov. | Tekstur: 1. Mós. 1,27-28 | bíbliuorð: 1. Mós. 1,27 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




*Nr. 24* *21. november 2021* *81. árg.*

# Hevur tú svikið?

*„Jesus segði við teir: „Í nátt fara tit allir at svíkja meg…“*
*Matt. 26,31 N.S.*

Náttina fyri deyða sín segði Jesus: „Í nátt fara tit allir at svíkja meg.“ Tí at skrivað stendur: „Eg skal sláa hirðan, og seyðafylgið skal spreiðast sundur.“ Men eftir at eg eri risin upp frá deyða, fari eg undan tykkum til Galilea. Har hittast vit.“ (Vers 31–32) Hugsa um hatta!

Lærusveinarnir høvdu brúkt 3 og ½ ár saman við Jesusi. Teir høvdu gingið saman við honum, tosað við hann, hoyrt hansara boðskap og sæð hansara undurgerðir – um teir kundu svíkja, so kunnu vit øll. „Fara tit allir at svíkja meg?“ spyr Jesus. Men Pætur royndi at mótmæla. „Kanska fara allir hinir at svíkja teg, men eg skal ikki!“ (Vers 33).

Hetta var ikki tann allarbesta løtan hjá Pæturi. „Kanska fara allir hinir…“ Hástórur. „Eg svíki ongantíð.“ Hann var sær sjálvum nóg mikið.

Álitið hjá Pæturi var í hansara egnu styrki. Kortini fór styrkin hjá Pæturi at fáa ein enda. Jesus visti tað: „Pætur, Pætur! Satan hevur kravt at fáa tykkum útflýggjaðar. Hann ætlar at skilja tykkum allar frá mær, eins og dumban verður sáldað frá hveitini. Men eg havi biðið um, at tú skalt varðveita trúnna á meg. Og tá ið tú kemur aftur til mín, skalt tú taka tær av hinum.“ (Luk. 22,31–32 N.S.).

Satan vildi leypa á og royna Pætur. Men Satan hevði ongantíð kunnað sett fram krav um hann. Hví? Av tí at Jesus var sterkur. „Eg havi biðið fyri tær.“ Og her er ein undurfullur

sannleiki – Jesus biður eisini fyri tær: „Faðir, syrg fyri at teir halda fast við teg. Soleiðis verða teir eitt eins og vit… Eg biði ikki bara fyri lærusveinum mínum, men eisini fyri øllum, sum trúgva á meg, tí at lærusveinarnir hava sagt teimum frá um meg…“ (Jóh. 17,11 og 20 N.S.) Vil Gud svara Kristi bøn tína vegna? Hvat heldur tú? Sjálvandi vil hann tað!

*„…et Ord til Dagen“* - *Effie Campbell* umsetti.

# Broytingin má koma innanífrá

*„Lovaður veri Guð og faðir várs Harra Jesu Krists,*
*sum eftir miklu miskunn síni hevur endurføtt okkum*
*til livandi vónar fyri uppreisn Jesu Krists*
*frá deyðum“. 1. Pæt.1,3.*

Ein kvinnuligur trúboðari kom inn til eini ensk hjún í Suðurafrika. „Hvat er tað, sum tú lærir afrikanarar?“ spurdi maðurin.

„Eg læri teir tað, sum evangeliið sigur,“ segði trúboðarin. „Eg vísi teimum, hvussu synd skilir okkum frá Gudi, og eg vísi teimum, hvussu Harrin Jesus doyði í okkara stað á krossinum at frelsa okkum frá syndum okkara, og um vit ikki taka ímóti hesu frelsu, koma vit ongantíð inn í Himmalin.“

Maðurin spurdi, hvørjar syndir hon tosaði um, og hon svaraði, at tað vóru millum aðrar at stjala, lúgva og banna og tilbiðja teir illu andarnar.

„Ja,“ segði maðurin, „tað er mikið gott; men tit vænta ov nógv av teimum, teir eru als ikki til reiðar at verða undirvístir í religión. Lær teir heldur at vera ærligar og at liva siðiliga, tað er alt, teir eru førir fyri at skilja. Tað fer at taka fleiri ættarlið enn, áðrenn teir kunnu fata nakað um Gud.“

„Tú misskilir alt, tí ongin læra er, sum kann gera teir ærligar, reinar og siðiligar. Broytingin má koma innanífrá, og tað hendir bert, tá ið Jesus kemur inn í hjartað, tí so tekur hann alla syndina burtur og gevur okkum ynski og vilja at gera hitt rætta.“

„Eg eri ikki religiøsur,“ segði maðurin, „eg gangi næstan ongantíð í kirkju.“

„Tað at ganga í kirkju og á møti er ikki tað, sum frelsir eina menniskju. Bert Jesus frelsir. Hann gav lív sítt fyri syndir okkara. Frelsan er ein gáva, um vit bara vilja taka ímóti henni,“ segði trúboðarin.

„Ja,“ helt maðurin fyri, „Jesus er so miskunnsamur. Hann man óivað fara at fyrigeva mær.“

„Ja, men treytin er, at tú tekur ímóti honum sum tínum persónliga Frelsara,“ segði trúboðarin. „Tú vart noyddur at giftast, áðrenn kona tín av sonnum gjørdist kona tín, og kennskapur tín til hennara frammanundan hesum kundi ikki binda tykkum saman á sama hátt sum hjúnalagið, og ein vissur kunnleiki um Jesus hjálpir tær heldur ikki. Tú mást taka ímóti honum, áðrenn hann er tín og tú hansara.“

Brádliga stóð alt so greitt fyri honum, og hjúnini vórðu ógvuliga rørd, tá ið trúboðarin eggjaði teimum at falla á knæ og yvirgeva seg til Jesus og bjóða honum at koma inn í hjarta sítt.

*„Kirkeklokken“.* - *Effie Campbell* umsetti.

## Ljósið skínur í myrkrinum, og myrkrið tók ikki við tí. (Jóh. 1,5).

Johs. Magelund, prestur, minnist aftur á ein jólaaftan fyri árum síðani: Tað var jólaaftan í Keypmannahavn 1938. Vit vóru nýgift, og hetta var fyrsti jólaaftan, vit skuldu halda í heimi okkara. Tað var tí ikki so lætt at skula lata konu sína vera einsamalla eftir við hús, meðan eg fór inn í miðbýin til eina jólaveitslu fyri heimleys. Men klokkan 8 á kvøldi mátti eg fara. Eg fari seint at gloyma spákingartúrin eftir Dronning Louises brúgv og gjøgnum tær stillu gøturnar. Aftan fyri vindeyguni í teimum túsund heimunum strálaðu jólatrøini. Í Frederiksborggøtu kom brádliga ein maður fram úr einum portri í teirri fólkatómu gøtuni. Hann vildi selja mær blaðið hjá teimum arbeiðsleysu „Livets Kamp“.

„Men hví ganga tygum her og frysta sjálvan jólaaftan?“ spurdi eg. „Komið við mær inn í jólaveitsluna!“

„Nei, takk!“ svaraði maðurin.

Eg royndi at greiða frá veitslumáltíðini, jólatrænum og gávunum, sum hann alt samalt skuldi fáa lut í. Men nei, hann vildi heldur hava 1 krónu enn at vera við til sjálvt ta mest strálandi jólaveitsluna.

Eg gekk víðari, tungur í huga. At eitt menniskja kundi søkka so djúpt, at tað á sjálvum ársins háheilagasta kvøldi heldur velur 1 krónu fram um at uppliva eina jólaveitslu!

Og tankarnir gingu víðari: Hvussu mong vilja ikki heldur hava eini jól, sum bara umfata mat og gávur, heldur enn at taka ímóti innbjóðingini til ta sonnu jólaveitsluna, har Jesus Kristus er miðdepilin. At menniskju í teirra stuttskygni kortini lata seg blinda av einari stuttari njóting og harvið verða lumpað, so tey missa ta stóru ævigu jólagleðina.

Henda uppliving kastaði eina serliga glæmu yvir Jóhannesar Evangeliið, kap. 3,19: „Men hesin er dómurin, at ljósið er komið í heimin, og menniskjuni elskaðu myrkrið meira enn ljósið, tí at gerningar teirra vóru óndir.“ Ófatiliga mong menniskju síggja ljósið skína, men finna onga meining í tí, so langt hevur myrkrið breitt seg í okkara ætt. Ljósið skínur í myrkrinum, men myrkrið tekur ikki við tí.

Kanska eru vit, sum kalla okkum kristin, uppií og fjala ljósið fyri øðrum. Latið okkum biðja um, at ljósið í krubbuni má skína so bjart, at menniskju mugu síggja, hvat ið tað er, sum hevur virði, og ikki lata seg blinda, so smálutir og stuttar njótingar lumpa tey, so tey missa ta sonnu jólagleðina.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Stúranir eru sum eitt kavablak. Tað byrjar lítið, men um tú heldur á at rulla tað fremeftir, verður tað so stórt, at tað kann jarða teg. Tú verður undirkavaður. Kavablakið (stúranirnar) vindur bara upp á seg, og tað verður størri og størri.

*e.c.* ums.

---

Tá ið tú eftir jól bert jólatræið út, missir tað nálirnar og er hálvnakið. Hví? Tí tað hevur mist sambandið við rótina. Soleiðis er tað eisini við okkum menniskjum. Tá ið vit hava kvett sambandið við okkara kristna arv, við Jesus okkara Frelsara og við Bíbliuna, so gongst ikki væl. Tað síggja vit, tá ið vit hyggja rundan um okkum.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 21. nov. | Tekstur: | 1. Mós. 4,1-12 + 16 | bíbliuorð: | 2. Mós 20,13 |
| 28. nov. | Tekstur: | 1. Mós. 6,9-22; 7,6-7 + 17 + 21 | bíbliuorð: | 1. Mós. 6,22 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74